# GÓÐIR BRÚKTIR BILAR

**Nissan Micra 1.0**
Grønur, 3 hurðar,
árg. 1998,
**76.000**

**Nissan Primera 1.6**
Player, vínreyður, 4 hurðar,
árg. 1995, 99.000 km.
**98.000**

**Nissan King Cab 4x4 TD**
Hvitur, 2 hurðar,
árg. 1995, 75.000 km.
**105.000**

**Peugeot 306 Diesel sedan**
grønur, 4 hurðar,
árg. 1995, 163.000 km.
**88.000**

**Opel Corsa Swing 1.4 16v**
Bláur, 5 hurðar,
árg. 1997, 57.000 km.
**93.000**

**Ford Escort 1.8 Diesel**
Blágráur, 3 hurðar,
árg. 1992, 135.000 km.
**37.000**

**Ford Mondeo 2.0 Aut.**
Grønur, 4 hurðar,
árg. 1994, 138.000 km.
**98.000**

Sosialurin

**Honda Accord 1.8**
Grønur, 4 hurðar,
árg. 1996, 100.000 km.
**117.000**

**Opel Astra ST. Car**
Bláur, 5 hurðar,
árg. 1997, 115.000 km.
**105.000**

**Opel Corsa 1.4 Swing**
Reyður, 3 hurðar,
árg. 1998.
**90.000**

**Opel Corsa 1.4 16V, Swing**
Grønur, 5 hurðar,
árg. 1997, 42.000 km.
**95.000**

**Opel Corsa 1.4 Swing**
Bláur, 3 hurðar,
árg. 1998, 36.000 km.
**85.000**

**Opel Omega 2.5 V6**
Grønur, 4 hurðar,
árg. 1996, 65.000 km.
**157.000**

**Opel Vectra 1.8 16v**
Bláur, 4 hurðar,
árg. 1998, 41.000 km.
**158.000**

**Peugeot 106 1.1**
Bláur, 3 hurðar,
árg. 1996, 85.000 km.
**65.000**

**Peugeot 306 XS 2.0**
St. Car, bláur, 5 hurðar,
árg. 1998, 29.000 km.
**128.000**

Bilarnir finnast eisini á:
**www.nissan.fo**

**P/F Meinhardt Arge**
Tjaldursvegur • Postsmoga 3171 • 110 Tórshavn • Tel. 31 61 61


# Skrivstovunæmingur

Á Dómaraskrivstovuni er eitt lærupláss leyst at søkja til setan 1. mars 2001.

Umsøkjarar mugu hava staðið fráfaringarroynd fólkaskúlans, harumframt FHS-, HH-prógv ella líknandi.

Næmingurin verður settur sambært felagssáttmála millum Statsansattes kartel og Finansministeriet og sáttmála millum HK/STAT og Finansministeriet.

Lærutíðin fyri næming við FHS-prógvi er 3 ár og fyri næming við HH-prógvi 2 ár. Í lærutíðini skal næmingurin til Danmarkar á handilsskúla í 15 vikur tilsamans.

Byrjunarlønin fyri næming við 3 ára lærutíð 9.109,58 og fyri næming við 2 ára lærutíð 9.582,42.

Hondskrivað umsókn, prógv og møgulig viðmæli verða at senda Dómaraskrivstovuni í seinasta lagi 20. februar 2001.

**Sorinskrivarin (dómarin) í Føroyum**
tann 12. februar 2001

Joen H. Andreassen
adm.

# Deildarskrivari til Søgu- og samfelagsdeildina

Søkt verður eftir deildarskrivara til Søgu- og samfelagsdeildina á Fróðskaparsetrinum.
Starvið er fyribils fyri eitt ár, frá 1. apríl 2001 ella skjótast til ber.

Starvið er fjølbroytt, og fevnir um alt vanligt skrivstovuarbeiði, serliga í sambandi við leiðsluna á Søgu- og samfelagsdeildini. Starvið setur krøv um góðan førleika til at arbeiða sjálvstøðugt, og um góð evni at samskifta og samstarva við onnur. Góður kunnleiki til mál og til arbeiði við vanligum edv-forritum er ein fortreyt.

Starvið er eitt 3/4 starv og lønt í 12. lønarflokki sambært sáttmála millum starvsmannafelagið og Føroya Landstýri.

Meir fæst at vita um starvið við at seta seg í samband við Søgu- og samfelagsdeildina.

Umsókn við avriti av prógvi v.m. verður at senda Søgu- og samfelagsdeildini í seinasta lagi 2. mars 2001.

**Søgu- og samfelagsdeildin**
J. C. Svabos gøtu 7
100 Tórshavn
Tlf. 317009

UNITED seafood

# KT-SAMSKIPARI

Av tí at KT-samskiparin hjá okkum fer í annað starv verður søkt eftir KT-samskipara til Føroya Fiskavirking, at byrja skótast gjørligt.

**Arbeiðsuppgávurnar hjá KT-samskiparanum verða:**

- Dagligur rakstur av øllum KT-innleggingunum hjá P/F Føroya Fiskavirking, íroknað stuðul til allar nýtarar.
- Samstarv og samskifti við uttanhýsis KT-útvegarar.
- Saman við nýtarum at gera kravspecifikatiónir sum grundarlag fyri menning av skipanum.
- Dagføring av útgerð og skipanum.
- Útbúgving av nýtarum, serliga til Microsoft Office skipanir.

**Netskipanir:**
Allar deildir á Føroya Fiskavirking eru bundnar saman við einum felags netið, so at brúkarar og rættingi kunnu uppsetast á einum staði.

| | |
|---|---|
| • Høvuðsskipan: | Novell Netware |
| • Aðrar skipanir: | Windows NT og Winframe |
| • Internet: | Linux |

**Felags forrit:**

| | |
|---|---|
| • Bókhaldsskipan: | Concorde XAL |
| • Framleiðsluskipanir: | Marcl MPS, Com-Data skipanir |
| • Goymsluskipan: | Plattaskipan (Com-Data), |
| • Klokkuskipan: | Com-Data |
| • Lønarskipan: | Com-Data |
| • Aðrar skipanir: | Ymiskar Access databasur |

**Teldur:**
Pc teldur við Win95/Win98 og Office97/2000.

**Krav er at umsøkjari hevur:**

- Kunnleika til og royndir við Novell Netware skipað lokalnet.
- Royndir við datasamskifti, eisini í samband við Internetið.
- Góðan kunnleika til Microsoft Office.
- Kunnleika til Concorde XAL er ein fyrimunur, men eingin treyt.

**Vit kunnu bjóða:**

- Eitt framkomið fakligt umhvørvi.
- Eitt virkið og framkomið framleiðsluumhvørvi.
- Møguleikar fyri persónliga menning og eftirútbúgving.
- Løn sambært avtalu.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Suna Joensen á tlf. 355555. Umsóknin skal sendast áðrenn 26. februar 2001 til

**UNITED SEAFOOD, P/F Føroya Fiskavirking**
Att.: Leivur Michelsen
Postboks 3183
FO-110 Tórshavn

Virkini liggja spjødd um alt landið, og tí er nakað av ferðing. Edv-deildin heldur til á høvuðsdeildini í Tórshavn. Arbeiðstíðirnar eru skiftandi.


www.sosialurin.fo


www.sosialurin.fo




Postverk Føroya

# Starv sum økisleiðari í Norðoya postøki

Søkt verður eftir økisleiðara til Norðoya Postøki skjótast til ber.

**Arbeiðsuppgávur:**
Økisleiðarin kemur at hava dagligu leiðsluna av postvirkseminum í Norðoyggjum. Starvið er fjøltáttað og mennandi. Tú kemur í samband við hópin av viðskiftarfólki.

Økisleiðarin hevur í høvuðsheitum ábyrgdina av fylgjandi:

- Postavgreiðslunum, postútberingini og postflutninginum í Norðoyggjum
- Starvsfólkaleiðslu, -trivnaði og -menning
- Roknskapi
- Hølisviðurskiftum og útbúnaði

**Fakligt førleikakrøv**
Ynskiligt er, at tú hevur útbúgving innan starvsfólkaviðurskifti, bú- og roknskap, teldu, rakstur og marknað á merkonomstøði ella líknandi. Starvsroyndir eru ein fyritreyt fyri setanini. Postlig útbúgving er ein fyrimunur, men eingin treyt.

**Persónlig føleikakrøv eru**

- at hava góð samstarvsevnir
- at vera úrtøkuskapandi
- at sýna hugfangandi leiðsluhugburð
- at hava framtakssinni
- at standa ímóti trýsti.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Føroya Postfelag. Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Berg í Garði, postverksstjóra.

Umsóknir skulu verða postverkinum í hendi í seinasta lagi hin 23. februar 2001 og skulu sendast til Postverk Føroya, Postverksstjórin, Postsmoga 3009, 110 Tórshavn

Um stovnin: Postverk Føroya er stovnur undir Vinnumálastýrinum. Virkisuppgávan hjá stovninum er at veita føroya fólki eina dygdargóða posttænastu. Postverkið er eitt av landsins størstu arbeiðsplássum. Á stovninum starvast um 300 fólk. Í Norðoya postøki

# Savnslærari til Føroya Fornminnissavn

Starv sum savnslærari á Føroya Fornminnissavni er leyst at søkja. Starvið er fulla tíð í 2001 og treytað av játtan eisini seinni.

Savnslærarin stendur fyri upplýsingarvirksemi savnsins og hevur pedagogisku ábyrgdina av og dagligu umsjónina við framsýningunum. Hann skal leggja til rættis og seta upp serframsýningar og stíla fyri savnsvitjanum, serstakliga hjá skúlaflokkum. Savnslærarin leggur til rættis undirvísingartilfar og annað upplýsingartilfar í sambandi við virksemi savnsins, m.a. á KT-økinum, og standur fyri tíðindatænastuni.

Áhugi fyri Føroya søgu, skapandi gávur, estetiskur ansur og pedagogiskt hegni eru fortreytir, somuleiðis góður kunnleiki til føroyskt mál. Tann, ið settur verður, skal hava læraraprógv ella BA-prógv í mentanarsøgu ella søgu ella aðra hóskandi útbúgving. Tað er ein fyrimunur, at umsøkjarin hevur gott innlit ella áhuga í kunningartøkni.

Løn og setanartreytir sbrt. sáttmála millum avvarðandi fakfelag og Fíggjarmálastýrið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Andras Mortensen, savnvørð, tlf. 310700.

Umsóknarfreistin er 28. februar 2001 kl. 9.00.

Skrivligar umsóknir við ævilýsing (CV), avriti av próvskjølum, viðmælum og øðrum viðkomandi skjølum skulu sendast til

**Føroya Fornminnissavn**
P.O. boks 1155
110 Tórshavn

# Stuðulsfólk

Søkt verður eftir avloysara fyri stuðul, sum fer í barnsburðarfarloyvi.

Stuðulin er til ein seks ára gamlan drong í Vágunum.

Arbeiðið hjá stuðlinum verður í heiminum og í Barnagarðinum Sýslan í Sørvági

- at stimbra dronginum við spæli og venjingum, og annars verða við til at geva honum ein innihaldsríkan gerandisdag, einsamøllum og saman við øðrum.
  Serligur dentur skal verða lagdur á málmenningina og samskifti við drongin og at fyrireika hann við ymiskum forskúla tilfari og venjingum til at fara í skúla í summar.
  Stuðulin skal kunna fara við honum til fysioterapi o.a.

Arbeiðið verður gjørt í samstarvið við familjuna, barnagarðin, Almannastovuna og onnur fakfólk.

Arbeiðið hjá stuðlinum verður 40 tímar um vikuna.

Setunartíðin er frá uml. 01.03.01 og fyribils til 31.08.01.

Lønar- og setunarviðurskiftini eru sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja tlf. 314822, Ragnhild Dahl.

Umsóknir mugu vera okkum í hendi skjótast gjørligt, tó í seinasta lagi 28.02.01 og skulu sendast til:

**Almannastovuna**
att.: Ragnhild Dahl
Box 3096
110 Tórshavn

# Konditara-/ Bakaralærlingur

Sóknast verður eftir einum konditara- ella bakaralærlingi at byrja beinanvegin.

**Sp/f S. Dimon**
Tlf. 371080 ella 210864

# www.israelsambassade.dk

Allan desember mánaða ár 2000 hevur ein plakat hingið í øllum tokum í Stórkeypmannahavn fyri at vísa dønum á heimasíðuna (website) hjá ísraelsku sendiharrastovuni (ambassaduni).

Felagið Vinir Ísraels í Føroyum vil virka fyri røttum tíðindum úr Miðeystri.

Tí vilja vit vísa á adressuna hjá einum amboði av stórum týdningi fyri at dagføra, hvat fer fram í Miðeystri og hvussu Ísrael skilir støðuna.

1. Hvat hendir beint nú?
2. Hvat liggur aftan fyri tað núverandi stríðið?
3. Hvat halda ísraelar um seinastu gongdina í Miðeystri.

Fá svar uppá hesar spurningar um Ísrael sum heild. www.israelsambassade.dk

**Vinir Ísraels í Føroyum**
Eliesar Arge
formaður




Vit gera alt
URTAGARÐSARBEIÐI

• Grasvøllir • Planting • Viðlíkahald
• Seta gravsteinar upp v.m.
• Gera tún við flísum ella oljugrúsi
• Grevstur í sambandi við olljutangaskifti o.a.

Spyr - tað kostar einki!

Við 25 ára royndum hava vit roynt tað mesta

Fa. SÍMUN DALSGAARD
Boðanesgøta • FO-188 Hoyvík
Tel. 31 54 78 • Fartel. 28 21 00 • Fax 32 04 78

**Reinsan**
*av teppum, møblum, bilsetrum o.ø.*
*Privat, fyritøkur og stovnar.*
*Allar støddir.*
*Tilboð verða givin.*
*Ring um prís.*

**Vaskarí & Reingerð**
**tlf. 316300**
**gsm 211312**
Við at reinsa, verður skapt eitt betri inniklima




**www.bilar.fo**